# eg máli



*Tað er neyvan uttan orsøk at Símun Poulsen dámar væl at mála skip. Klaksvík er jú fiskivinnuhøvuðsstaður okkara*

Finlandi, sum lat upp 20. mai og verður opin til 12. juli. Framsýningin var á Kettukicentret, sum er ein miðdepil fyri list sum er framd av menningartarnaðum.

Á hesi framsýningini vóru íalt 52 listafólk, sum vístu fram 175 verk. Av hesum 175 verkunum átti Símun Poulsen ikki færri enn 18.

Líkt var til, at stórur áhugi var fyri hesi framsýningini, sum á enskum kallaðist »Strange birds, odd fisher – Nordic exhibition in Hameenlinna«:

Finska tíðindatænastan var eisini við til setanina av framsýningini, og var eitt innslag í sjónvarpinum sama kvøld, umframt umrøður í hinum fjølmiðlunum.

Eitt av finsku bløðunum vísti Símuni serligan áhuga, og hevði eina frásøgn, ið fylti eina hálva síðu, um verkini hjá Símuni.

- Jú, tað var stuttligt at vera við, og práta við hini um, hvussu tey málaðu, sigur hann stutt.

## Seld verk

Hetta at luttaka á framsýningum er ikki ókent fyri Símun.

Hann hevur áður havt verk á teirri sensureraðu framsýningini á ólavsøku. Hann hevur eisini havt framsýning á Jinx í Havn, og her hendi tað gleðiliga, at bæði føroyingar og útlendingar keyptu verk hansara.

Nú Norðoyastevnan 2008 stendur fyri durum verður eisini ein framsýning á skránni um vikuskiftið. Og her verður Símun sjálvandi við.

Umframt hetta er verkstaðurin á Brekku opin báðar stevnudagarnar í fleiri tímar.

- Eg vóni, at nógv fólk koma her, sigur hann og brosar.

***»Símun er ikki øðrvísi enn aðrir listamenn. Teir liva ikki av máling eina«***

# - Nú fari eg til stikksagina

**Verkstaðið á Brekku í Klaksvík er listarliga heimstaðið hjá Símuni Poulsen. Henda mikumorgunin í farnu viku tá Snoddi vitjar her, er hugurin at tekna og mála sjónligur frá fyrstu løtu.**

**Klokkan er farin av 10, og í niðaru hæddini eru menn farnir undir dagsins gerning á timburverkstaðnum. Í einum horni stendur stikksagin, sum Símuni dámar væl at arbeiða við. Gott at hava okkurt at kopla av við!**

**Hann er júst komin til arbeiðis. Eingin orsøk er at skunda sær eftir pensli, litblýantum og pappíri. Klokkan er ikki so nógv enn, henda regntunga dagin í farnu viku.**

**Ein heitur drekkamunnur, sum starvsfólkini hava gjørt til reiðar, er ikki at forsmáa. Nú man vera tíð til eina mynd og til eina myndatøku.**

**Eins og so mangan áður setur hann seg stillisliga við borðið. Eitt blankt ark liggur fyri framman, og spurningurin er hvat myndevnið skal verða framt hesa løtuna.**

## Trygdin hjá sjómonnum

**Símun byrjar eftir niðastu linjuni við at tekna aldur á sjónum, og løtu seinni hómast fyrsta tekinið um, at myndevnið í morgun – og til æru fyri tíðindatænastuna – verður eitt skip.**

**Løtu seinni er longdin á skipinum greið, stýrihúsið er komið á, mastrarnar og nú kemur so eitt týdningarmikið ting umborð á einum skipi: Bjargingarbáturin. Hjá Símuni verður trygdin hjá sjómonnunum ikki gloymd!**

**Einar 20 minuttir seinni er tekningin liðug, og hann vísur errin fram listarverk sítt.**

**Men Símun er væl ikki øðrvísi enn aðrir listamenn. Teir liva ikki av máling eina:**

**- Nú fari eg at fáa mær ein bita, og síðani fari eg til stikksagina, sigur Símun Poulsen.**



*Við kønari hond og góðum blýanti verður eitt skip teknað. Símun Poulsen hevur serstakar gávur at gera beinar linjur beinar, uttan at brúka lineal*